# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

# Árligu fimleikaframsýningarnar hjá Ljósinum

Leygardagin 17. mars verða árligu fimleikaframsýningarnar hjá fimleikafelagnum Ljósinum í høllini á Hálsi. Fyrra framsýningin við teimum yngru liðunum verður kl. 14.00, og tann seinna við eldru liðum felagsins verður kl. 18.00. Tó verða kappingarliðini við á báðum framsýningunum. Atgongumerki kunnu keypast tveir tímar, áðrenn sýningarnar byrja.

Tey seinnu árini hava vit roynt at skipa framsýningarnar soleiðis, at tær fáa ein serligan hátíðardám. Eitt nú hava vit roynt glæmuljós, og var hetta eftir okkara tykki so væl eydnað, at tað verður roynt aftur. Í ár hava vit eisini okkurt nýtt á skránni, ið fer at geva framsýningunum enn meiri hátíðardám.

Sum nakað nýtt fara vit at hava okkara motiónslið við til tí seinnu fimleikaframsýningina. FM- kappingin í estetiskum fimleiki fyri gentur hevur júst verið, og luttakandi lið felagsins verður eisini við í framsýningini, men vanliga fimleikaframsýningin hjá felagnum fer fyrst og fremst at sýna fram almenna fimleikin og ein part av tí, sum liðini hava fingið burturúr í vetur.



*Árliga fimleikaframsýningin hjá Ljósinum verður á skránni leygardagin. Tey yngru liðini hava framsýning kl. 14, meðan eldru liðini hjá felagnum hava framsýning kl. 18*

## Støkk árliga fimleikaframsýning

FIMLEIKUR
*Tíðindaskriv*

Komandi vikuskiftið verður árliga fimleikaframsýningin hjá Støkk í ítróttarhøllini í Runavík. Leygardagin 17. mars byrjar framsýningin kl. 17 við teimum yngru liðunum, og sunnudagin 18. mars kl. 16 við teimum eldru liðunum. Framsýningarnar eru mettar at vara umleið 2 tímar báðar dagarnar.

Eins og undanfarin ár hevur felagið nógvan fjølbroyttan fimleik at vísa fram, m.a. móðir og barn, børn 5-6 ár, vanligu liðini frá 1.-10. flokk, kvinnur, reiðskapslið, estetisk kappingarlið og blandað lið við kvinnum og monnum. Undir framsýningunum verða merki og ídnisprógv handað.

Felagið skipar fyri páskareggjatombola og kaffisølu í gongini í ítróttarhøllini báðar dagarnar. Atgongumerkjasølan byrjar ein tíma áðrenn framsýningina. Kostnaðurin er 80 kr. fyri vaksin og 20 kr. fyri børn.

Fimleikafelagið Støkk

# Kyndil vann trygt

**Besta kvinnuliðið hjá Kyndli vann tryggan sigur, tá tær tóku ímóti H71 í upp- og niðurflytingardysti til Sunset kappingini komandi ár**

HONDBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Best kvinnuliðið hjá Kyndli í hondbólti megnaði ikki at koma í hálvfinalurnar í landskappingini, og tí skuldu tær spæla um sessin í bestu deildini ímóti teimum ovastu liðunum í næstbestu kvinnudeildini.

Her er Kyndil enda í bólki saman við VÍF og H71, og hesi trý liðini skulu so kappast innanhýsis um tvey pláss í Sunset deildini komandi kappingarár. Fyrsti dysturin í hesum bólkinum var á skránni í gjárkvøldið, tá Kyndil tók ímóti H71, og her var slett eingin ivi um úrslitið.

### H71 fylgdi við í fimm minuttir

Sjálvt um kyndilskvinnurnar vóru mettar at vera stórfavorittar undan dystinum ímóti H71, so vóru tað gestirnir úr Hoyvíkini, sum fingu eina betri byrjan uppá dystin. Tær løgdu seg á odda 2-0 mest sum alt fyri eitt, men ikki gekk long tíð, so hevði Kyndil javnað til 3-3. Eftir hetta skoraði Kyndil seks mál á rað, og so var í roynd og veru einki at gera hjá H71.

Sum hálvleikurin leið, vaks munurin bara á liðunum, og eitt skifti førdi Kyndil við níggju málum í fyrra hálvleiki. Móti endanum av hálvleikinum gekk tó aftur betri hjá H71, og her megnaðu tær at halda Kyndli frá at skjóta mál síðstu fimm minuttirnar, og hetta gjørdi, at munurin bert var seks mál í steðginum.

### Kyndil avgjørdi dystin

Var nakar sum helst spenningurin, tá liðini komu út til seinna hálvleik, so hevði Kyndil køvt hendan 10 minuttir inn í seinna hálvleik. Nú førdi Kyndil brádliga við 11 málum, og her var sum so einki at gera hjá H71.

Venjararnir valdu at taka eitt time out, og næstu løtuna gekk nógv betri hjá H71. Nú hingu tær væl í Kyndli, og tær megnaðu eisini at minka um munin, soleiðis at Kyndil bert førdi við 10 málum, tá góðir fimm minuttir vóru eftir at spæla. Móti endanum vísti Kyndil tó aftur, hvat var betra liðið henda dagin. Síðstu seks minuttirnar an H71 bert fekk eitt mál, og so vann Kyndil ein tryggan 15 mála sigur í fyrsta dystinum í uppflytingarbólkinum.

## FAKTA

**Kyndil-H71 34-19 (13-7)**
**Málskjúttar:**
**Kyndil:** Randi Wardum 9, Lina Andriulyte 6, Jacklin Durhuus 6, Bjørg Syderbø 4 (1), Ronja M. Mikkelsen 4 (2), Anja Heinadóttir 2, Kari Ann Petersen 1, Súsanna Petersen 1, Barbara Egilstrøð 1
**H71:** Kirstin Helgadóttir 6 (1), Edith Dahl Olsen 4 (1), Fríða Næs 3, Ada Joensen 2, Guðrun Poulsen 2, Sonja Kristoffersen 1, Marna Rubeksen 1
**Brotskøst:** Kyndil 3, H71 3
**Útvísingar:** Kyndil 1, H71 3
**Dómarar:** Eyðun Samuelsen & Andreas F. Hansen